# 60 prosent av finsku ráðharrunum eru kvinnur

**12 av 20 ráðharrum í nýggju finsku stjórnini eru kvinnur. Hósdagin verður stjórnin formelt sett av Tarja Halonen, sum er fyrsti kvinnuligi finski forsetin**

Tá forsetisráðharrin Matti Vanhanen almannakunngjørdi yvirlitið yvir nýggjar ráðharrar, segði hann seg vilja hava eina stjórn, sum virðir javnstøðu millum kynini.

Men tungu sessirnir í fíggjar-, verju- og uttanríkisministeriium verða kortini settir av monnum.

- Hetta líkist einum heimsmeti. Summar stjórnir hava verið helvt um helvt menn og kvinnur, men 60 prosent kvinnur í eini stjórn er ógvuliga høgt, sæð úr einum altjóða sjónarhorni, sigur Jaana Kuussipalo, politiskur greinari við lærda háskúlan í Tampere.

Í finska parlamentinum eru 42 prosent av limunum kvinnur eftir valið í mars í ár. Hetta hendi 100 ár eftir, at Finnland sum fyrsta land í heiminum innførdi atkvøðurætt til kvinnur.

# Sølustevna í Sandoynni 4. og 5. mai

SØLUSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Sølustevnan hjá B.71 bjóðar vælkomin Dýra Biðidag 4. mai, og leygardagin 5. mai.

Tíggjunda árið á rað, bjóðar lítla, hugnaliga sølustevnan hjá B71 alt tær tørvar. Ein væl blandað samanrenning av tí mesta. Hugnaliga umhvørvið við Meginskúlan er karmur um alskyns tilboð til tín sum kunda. Samstundis sum tú keypir í stóra og fjølbroytta úrvalinum, eru tilboð, ið bjóða børnunum vælkomnum. Til at hugna um hesar dagarnar hava vit fingið alskyns undirhald til allar aldursbólkar.

Trøllapætur og omman.
Fríðbjørg Jensen
Niels Midjord
Egin, Sølvi og Terji

Harumframt:
Klovnar
Mótasýning
Listaframsýning
Harley treff í skúlagarðinum
Uppboðssøla
Køku og bommtombola
Matsøla
Hugnakvøld í Virkinum
Dansur við Sandoyar Dansiband

Stevnan verður sett Dýra Biðidag kl. 15.00 av Peturi Højgaard, kommunulækna.

Luttakandi sølufyritøkurnar eru hesar: Rólant Vidtfeldt, Ellubitin, Eik Banki, Klædnabúðin, Kurvin, Alexandra, Diva, Icon, Ford, Fótarøkt, Fótprýði, La Femme, Føroya Tele, MBM, Volare, Tøting, C-IT.

Kunningarstovan í Sandoynni luttekur eisini og bjóðar tær Sandoynna sum ferðavinnumøguleika.

Øll atgongumerkini til sølustevnuna eru samstundis lutaseðlar, har góðir vinningar eru at vinna.

Hugnakvøld verður í Virkinum leygarkvøldið, har meistarakokkurin Elisabeth Myllhamar matgerð, og Sandoyar Dansiband spælir til dans.

- Herjið um fjørðin, tí her er alt at vinna, og einki at tapa. Júst somu støðu er B.71.í, tá ið teir sunnudagin 6 mai, taka ímóti B.36, sigur B71 í tíðindaskrivi.

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Kristin Poulsen*
*Fjalsvegur 2*
*530 Fuglafjørður*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: KRANSAKAKAN

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| K | R | O | S | S | O | R | Ð | A | G | Á | T | A | N | | F |
| A | O | R | T | A | | | | U | A | | A | S | A | R | I |
| F | A | Ð | I | R | K | E | N | S | L | A | | K | R | O | M |
| F | R | A | G | D | A | R | Í | T | R | I | V | | T | M | M |
| I | | B | | I | L | O | | R | Ó | K | U | R | | A | H |
| M | J | Ó | A | N | E | S | | A | P | O | R | I | | R | U |
| U | S | K | | I | V | | E | L | I | | D | | G | I | N |
| N | | I | | A | A | | L | I | | G | E | V | I | N | D |
| N | I | N | A | | L | I | T | A | Ð | A | R | | | | R |
| U | N | | K | L | A | R | A | | | N | I | B | E | | A |
| R | A | K | U | L | | A | | S | I | D | N | E | Y | | Ð |
| 500 | K | I | T | L | I | | U | L | K | U | G | A | R | N | |
| S | T | E | T | L | A | N | D | I | | R | | | U | I | G |
| S | I | V | | | T | A | I | G | A | | N | O | R | Ð | I |
| S | V | | H | V | A | N | N | I | R | N | A | R | | A | T |
| S | T | Á | L | I | | | E | Ð | I | N | | M | I | N | A |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**Loysunarorðið:** ..........................................  **501**

Navn: ..........................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: ..................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*

- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***